# Skiljið Mentamálaráðið sundur!

ODDFRÍÐUR MARNI RASMUSSEN



**Til lukku Eyðun Johannesen**

Fyrst vil eg nýta høvið at ynskja slóðbrótaranum Eyðuni Johannesen hjartaliga til lukku við sjeyti ára føðingardegnum. Fáur mann vera, sum Eyðun, ið hevur ment listina so dyggiliga sum hann. Eyðun hevur verið við til at menna listina sum eitt yrki, og hevur verið fyrimyndin hjá nógvum, ið vilja liva av at skapa og útinna list á yrkislistarligum støði.

Eg eri so rørandi samdur við Eyðuni, tá ið hann sigur, at okkum mangla rithøvundar, ið tora at skriva leikrit. Vit eru kanska eitt sindur konservativir, men orsøkin til, at ikki so nógvir rithøvundar skriva leikrit er hon, at tað krevur, at rithøvundurin situr hugsavnaður í longri tíð. Hetta hevur hann ikki fíggjarliga orku til. Samfelagið er so lítið, og tí krevst av landinum, at hesi verða stuðlað, soleiðis, at friður er at skriva eitt verk út í eitt, og ikki verða brotin av. Vit skulu jú eisini hava pengar at liva fyri. Eftirsum, at marknaðurin er so lítil, so er tað ein landsuppgáva at høvundar fáa henda friðin, tí at eitt samfelag hevur ikki ráð at lata vera við at stuðla teimum fáu, sum veruliga kunnu tekna eina samfelagsmynd, sum onnur ikki síggja.

**Listin – uppraðfesting neyðug**

Í hesum sama Sosiali, sum føðingardagsheilsanin til slóðbrótaran Eyðun Johannesen stendur, skrivar mentamálaráðharrin, Kristina Háfoss, eina drúgva grein við yvirskriftini: "*Søguliga stór framstig innan útbúgving í 2008*." Ógvuliga áhugaverd grein. Har eru nógvir glottar at hóma. Men sum yvirskriftin sigur, so eru allir glottarnir í skúlaverkinum, og tí kann yvirskriftin bara ljóða sum hon ljóðar, hóast mentamálaráðharrin skrivar eina rúgvu um mentan.

Tað er gleðiligt at skúlaverkið verður endurskoðað. Tað treingir til. Ein partsyvirskriftin ljóðar soleiðis: "*Mentan – uppraðfesting alneyðug*." Ja, tað er vist, serliga um vit lesa víðari undir somu partsyvirskrift. Har stendur skrivað: "*Mentan er høvuðsorsøkin til, at vit búgva her í Føroyum*." Hesum trúgvi eg ikki, tí at um mentanin var høvuðsorsøkin til, at vit liva í Føroyum, so átti hon at staðið fremst í arbeiðssetninginum hjá mentamálaráðharranum. Ofta, alt ov ofta verða list og mentan blandað saman. List er eitt og mentan er eitt annað. Listin er í mentanini, men mentan nýtist ikki at vera ein partur av listini. Vit listafólk eiga at taka í egnan barm, og syrgja fyri, at ikki kemur bland í hesi bæði, og tað, sum hevur størri týdning er, at tað eru ymisk menningarstøði í listini. Tað er munur á áhugalist og yrkislit. Vit verða noydd til at viðurkenna, at tey, sum fáast við yrkislist eru tey, sum hava brúk fyri meiri stuðuli til sítt arbeiði, enn tey, sum hava list sum hjáputur. Eg síggi í greinini, at Kristina Háfoss leggur upp til, at Mentanargrunnur Landsins skal "*umskipast til at fevna breiðari*." Tað er ikki tað, sum Mentanargrunnurin skal. Tað rætta hevði verið, um Mentanargrunnurin varð gjørdur um til ein Listagrunn, ið stuðlaði listaverkætlanum, sum hava eina ávísa listarliga dygd. At ein slíkur listagrunnur stuðlaði listafólkum, sum veruliga vilja arbeiða sum yrkislistafólk, og sum nevndin í Listagrunninum metir veruliga skulu stuðlast. Eisini eiga yrkislistafólk at hava møguleikan at søkja starvsløn, fáa eina lønartrygt, ið kann tryggja teimum arbeiðsfrið í longri tíð og at ein virðilig upphædd verður sett av til, at nøkur listafólk kunnu koma á fíggjarlógina, og ikki við teirri óvirðiligu upphæddini, sum nú verður latin. Allar stuðulsjáttanir til list eiga at liggja í einum slíkum listagrunni. Í Føroyum og í útlondum eru nakrir fáir føroyingar, sum burturav liva av sínum listarliga arbeiði. Hetta eru slóðbrótararnir, ið hava sett Føroyar á heimskortið.

Vilja politikararnir arbeiða uppbyggjandi við teimum fimm álitunum, sum longu eru skrivað. Neyvan finst nakað økið í samfelagnum, sum er so mikið væl tilrættalagt sum ein lista- og mentanarpolitikkur. Um tey, ið ráða bara hyggja eftir teimum trimum seinastu álitunum á økinum: Mentan og menning, álitið um málpolitikk og visión 2015, so stendur í hesum álitum tað, sum skal til fyri at greiða úr hondum ein lista- og mentanarpolitikk, sum veruliga ger mun.

**Skiljið Mentamálaráðið sundur!**

Aftur til yvirskriftina í greinini hjá mentamálaráðharranum. Mentamálaráðið er soleiðis skrúva saman, at tað umsitur bæði skúla- og mentamál. Hetta er ógvuliga óheppið. Ein skuldi trú, at hetta hekk óloysiliga saman, men so er ikki. Nærum allir mentamálaráðharrar (undantøkini eru Tórbjørn Jacobsen og Annlis Bjarkhamar) hava tann ótrúliga eginleikan, at teir fyrst hugsa um skúlan, og tá ið teir hava ein fríløtu, hugsa teir um lista- og mentanarpolitikk. Nógvir bara hugsa og handla ikki, aðrir gera okkurt við sína tankar, men eru ógvuliga varnir at taka avgerðir, ið muna. Tað hevði tí verið ógvuliga passandi, um hetta ráðið, ið arbeiðir við skúla og mentan varð býtt sundur, soleiðis, at vit fingu eitt menta- og listamálaráð og eitt skúlaráð. Hitt tykist ikki at rigga.

Ongantíð áður hevur listin verið so sjónlig, sum til hetta valið. Vit vónaðu at okkurt fór at henda. Men onki hendi, hóast føgur orð. Fólk eru farin til verka, (sí greinina hjá Hugini Eide í sama Sosiali) og arbeiða við verkætlanum, tí at tey roknaðu við at pengar vórðu settir av til hetta. Men so varð ikki. Hetta er at halda fólk fyri turra spott. Um politikarar hava nakra sum helst virðing fyri sínum politiska starvi, so eiga teir at fara til verka (ikki bara ætla) við høvuðsorsøkini til at vit velja at liva í Føroyum – nemliga, at virka soleiðis, at tey skapandi og útinnandi listafólkini verða vird sum ein samfelagsbólkur, ið hevur sama tørv sum onnur í samfelagnum.

# Og hvat so, Regin Jespersen?

SOFUS Í HORNI HANSEN



Fyrr var allur ítróttur spæl. Eisini fótbóltur. Í dag er fótbóltur mentan og verður undirborin í almennum, kommunalum og øðrum stuðuli.

Aðrastaðni er ítróttur eisini mentan. Men uppbýtið er ikki tað sama sum í Føroyum. Aðrastaðni er annað og meiri umfatað av tí, vit kalla mentan.

Roynt verður av øllum alvi at fanga ungdómin og fáa hann áhugaðan í skilagóðum tiltøkum, so tíðin ikki fer til spillu ella tað, ið verri er. Tað týdningarmesta er ikki at kriminalisera ungdómin, tí gert tú tað, so provokerar tú hann og hann endar á einum síðuspori.

Nú hevur løgreglan kriminaliserað ein stóran part av Vágoynni. Í útvarpinum varð reypað um, at 25 súkklur vórðu tiknar av løgregluni. Eigararnir/foreldrini hava mist súkklurnar og kunnu vænta sær bót.

Og hvat so?

Vit kunnu skjótt verða samd um, at 14 ára gomul ikki eiga at koyra prutl á almennum vegi. Vit kunnu skjótt semjast um, at foreldur ikki eiga at geva smábørnum motorsúkklur. Tað tørvar okkum ikki magistaraprógv fyri at vita.

Men eitt sindur meira enn vanligt gonguvit skal eftir øllum at døma til fyri at síggja, at prutlkoyringin í Vágum er eitt symptom uppá eitt ella annað - ella eitt úrslit av eini skeivari gongd.

Nú sita 25 útskammaðir stórir drongir við ongari súkklu vesturi í Vágum. Og stórari skuld. Og eg kann ikki lata vera við at spyrja: Og hvat so, Regin Jespersen?

Var hatta tað? Hevur løgreglan nú loyst problemið? Eru nú øll glað og valdar friður nú aftur í Vágum?

Ella prutlar nú undir lokinum, har 25 stórir drongir sita kókandi av illsinni, hormonum og frustrasjónum og upphugsa, hvussu teir nú skulu hevna seg inn á Regin Jespersen? Inn á Vágoynna? Ella samfelagið?

Er úrslitið ikki bara total frustrasjón, nú løgreglan fjernaði úrslitið av skeivu gongdini, uttan yvirhøvur at kanna ella spyrja, hví støðan er sum hon er??

Fari tí í ganska vanligum treiskni enn einaferð fyri 1117. ferð at endurtaka, at problemið ongantíð var uppstaðið, um vit bóru okkum líka vaksið at sum í grannalondum okkara. Aðrastaðni hoyra t.d. smáar koyribreytir undir ítrótt og mentan. Aðrastaðni sleppa 10-12 ára gamlir drongir at royna seg í vardum umhvørvi.

Einki stað í Føroyum er betri egnað enn akkurát Vágoyggin til koyribreytir, har ungu mennirnir kundu spolað bæði hormonir og frustrasjónir úr kroppinum. Og tað mátti verið upplagt hjá løgregluni at verið við í slíkum arbeiði og stuðlað og hjálpt, heldur enn at nýta orkuna í hinum endanum, tá skaðin er hendur.

Umhvørvið er til tað har vesturi. Fleiri øki eru klár at koyra á. Royn nú og hugsa tankan, at tit høvu fótbóltsvallir har vesturi, men at eingin spældi á teimum? Innsatsurin hevði verið øgiligur fyri at fingið ungdómin út á vallirnar og tað hevði ikki skortað við vælvild og pengum.

Flyt so somu vælvildina yvir á hesar, sum ikki fáa somu sømdir sum teir, ið spæla fótbólt. Kanska har er ein Ole Olsen ímillum teirra. Kanska arbeiðið verður uppruni til besta speedwaybana í norðurlondum, hagar heimspressan kemur at hyggja at altjóða kappingum?

Ella síggja tit ikki dreymarnar fyri berum fótbóltum?

Hvat nú, Regin Jespersen?

# Gíslatøkan við Carlton

ÓLI JACOBSEN



Nú gongur á níggjundu viku, síðan Jan Højgaard av sínum eintingum lýsti mynstringarbann fyri Carlton og harvið koyrdi limirnar í FF í land.

Fyrst skal sigast, at tað kann sjálvsagt vera støður, har tað er rætt at lýsa eitt slíkt bann.

Men eitt slíkt stig skal í hvussu er fyrireikast væl. Grundarlagið skal vera í lagi, og eitt so stórt stig skal sjálvsagt samtykkjast av nevndini í felagnum. Tað skal eisini vera eitt sannlíki fyri, at eitt slíkt bann skjótt loysir trupulleikan.

Men, sum tað so týðiliga er komið fram, var hetta stig hjá Jan Højgaard gjørt í óðum verki. Hetta hevur higartil kostað hvørjum av landsettu manningini okkurt tal omanfyri kr. 100.000 krónur í mistari inntøku.

"Trumfurin" hjá Jan Højgaard segði hann vera, at hann skuldi steðgað landingina av Carlton uttanlanda gjøgnum ITF, altjóða flutningararbeiðarafelagsskapin. Hetta var tó frammanundan sera ivasamt, tí fólk á fiskavirkjum eru als ikki limir í ITF.

Sambært útvarpinum fekk FF fyrst í apríl bræv frá ITF, har teir søgdu seg als ikki vilja seta nakað landingarbann, men mæltu til at fáa eina semju við reiðaríið.

Tað er komið fram, at Jan Højgaard hevur ikki bert einki gjørt fyri at fáa eina semju alla hesa tíð. Hann hevur eisini sett føtur í spenni fyri at forða fyri eini og hvørji semingsloysn, sum partur av nevndini hevur arbeitt við.

Fyrst í apríl boðaði Jan Højgaard frá í Degi og Viku, at ITF nú fór at seta landingarbann í verk. Sum tað gongur sjón fyri søgn, vóru hesi tíðindini beinleiðis ósannindi. Hetta er eyðkent fyri hansara trúvirði annars.

Samstundis nýtir hann eitt slíkt orðalag, sum eingin rættsiktaður nýtir, og sum bert kann vera enn størri forðing fyri at finna eina loysn.

Tað groteska í hesum máli er, at Jan Højgaard fær kokkin at blokera ímóti eignum áhugamálum. Kokkurin fær nevniliga munandi meira við tí nýtta sáttmálanum hjá Carlton enn ídnaðarsáttmálan, sum verður kravdur bæði framyvir og við afturvirkandi gildi. Í besta fall fer kokkurin niður í løn, um kravið hjá Jan Højgaard verður eftirlíkað. Í ringasta fall kann kokkurin verða kravdur at gjalda meira enn kr. 100.000 aftur til reiðaran fyri ov nóg útgoldna hýru!

Jan Højgaard hevur sjálvur tikið grundarlagið undan kravinum um, at Carlton skal nýta ídnaðarsáttmálan. Nevniliga við at avtala júst við Hanus Hansen, at hann fyri eitt líknandi skip kann brúka kraftblokkasáttmálan, sum fyri Carlton gevur 20%! Sum skal setast í mun til tey 23%, sum manningin hevur fingið.

**Ørskapur**

Her kann stutt sagt sigast, at her er hvørki vit ella skil. Men hetta kemur ikki óvart á. Tað hevur frá fyrsta degi, síðan hann kom fram, verið greitt, at Jan Højgaard livir í eini fantasiverð, har øll onnur eru heilir og hálvir bandittir. Ráðini eru at "leggja flotan", uttan mun til hvat hetta kostar fiskimonnum. Ella hvønn skaða hetta ger teirra felag.